


*- Lopini á sjálvstýrisleið eru møguliga ikki so stór, men tey eru nógv og smá, og við einum semjusøkjandi og realpolitiskum framferðarhátti verða nógv úrslit og nógvar semjur náddar í mun til konfronterandi fullveldispolitikkin, segði løgmaður, tá valskrá Javnaðarfloksins varð løgd fram*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Sitat frá tíðindafundinum

Vit vilja gera upp við bundna, svart-hvíta "sambandloysing hugsunarháttin", sum hevur lyndi til at køva alt annað.
**Katrin Dahl Jacobsen um fullveldisspurningin**

- Fyri okkum er spurningurin um ríkisfelagsskapin eitt amboð og ikki eitt mál í sær sjálvum.
**Kristian Magnussen um ríkisfelagsskapin**

- Óli Breckmann fer spadserandi beinleiðis inn í tingbólkinum hjá teimum konservativu, og Kaj Leo Johannesen fer beinleiðis inn í samstarv við Venstre. Vit ætla harafturímóti at hava allar møguleikar opnar.
**Jóannes Eidesgaard um samstarvsmøguleikar á Christiansborg**

- Eg veit júst, hvussu tit journalistar hava tað. Okkara boðskapur tykist ullintur og óítøkiligur, og tit mangla eina góða yvirskrift. Men javnaðarpolitikkur snýr seg júst um at finna semjur fram um harðar konfrontatiónir.
**John Johannesen um javnaðarpolitikk**

Vit mangla gamla og samstarvssinnaða politiska vinalagi millum tjóðirnar
**Rigmor Dam um ríkisfelagsskapin**

Undir samráðingunum í 2000 við donsku stjórnina upplivdi eg, at talan gjørdist ov nógv um konfrontatiónir og ov lítið um úrslit. Eg havi ikki flutt meg, men eg gjørdist klókari av samráðingunum, og eg og flokkurin draga somu línu í sjálvstýrismálinum
**Helena Dam á Neystabø um hennara fortíð í fullveldisstjórnini**

# Hóvligi og semjusøkjandi flokkurin

**Breiðar semjur, hóvligur sjálvstýrispolitikkur og realpolitiskur framferðarháttur. Hetta eyðkendi valskrá Javnaðarfloksins til fólkatingsvalið, sum á tíðindafundi hósdagin varð løgd fram**

FÓLKATINGSVAL
*Heini í Skorini*
*heini_skorini@yahoo.com*

## Listin hjá Javnaðarflokkinum

Andrias Petersen, Gøta
Sylverius Jacobsen, Skáli
Sigfríður Abrahamsen, Fuglafjørður
Sunnleivur Højgaard, Runavík
Randi í Jógvansstovu, Leirvík
Mamy Dahl Sørensen, Viðareiði
Eyðgunn Samuelsen, Klaksvík
Vilhelm Johannesen, Klaksvík
Hans Pauli Strøm, Vestmanna
Soffi Egholm, Leynar
Thomas Arabo, Signabøur
Napoleon Magnussen, Miðvágur
Birgir Hansen, Sørvágur
Kristian Magnussen, Tórshavn
John Johannessen, Tórshavn
Katrin Dahl Jakobsen, Tórshavn
Helena D. á Neystabø, Tórshavn
Bjørg Joensen, Tórshavn
Rigmor Dam, Tórshavn
Elin Heðinsdóttir Joensen, Tórshavn
Gerhard Lognberg, Skopun
Jákup Birgir Mohr, Sandur
Jóannes Eidesgaard, Tvøroyri
Jónhild A. Nielsen, Tvøroyri
Henrik Old, Vágur
Mikkjal Sørensen, Porkeri

Við slagorðunum "vit mynda nýggju Føroyar" setti Javnaðarflokkurin hol á fólkatingsvaldystin. Flestu valevnini sótu til borðs niðri í Losjuni í Havn, og tað trýtur ikki við profilum á listanum.

### Sjálvstýrið

Heilt náttúrligt snýr fólkatingsvaldysturin seg í stóran mun um ríkisrættarligu støðuna millum Føroyar og Danmark, og tíðindafundurin hósdagin var einki undantak.

Í síni framløgu setti løgmaður og floksformaður Jóannes Eidesgaard hol á framstigini á sjálvstýrisleið, sum henda samgongan hevur slóðað fyri, og hann legði dent á, at tað, sum fullveldissamgongan frá 1998-2004 ikki megnaði á ríkisrættarliga økinum, hevur Javnaðarflokkurin megnað nú.

- Lopini eru møguliga ikki so stór, men tey eru nógv og smá, segði løgmaður og legði afturat, at við einum semjusøkjandi og realpolitiskum framferðarhátti verða nógv úrslit og nógvar semjur náddar í mun til konfronterandi fullveldispolitikkin. Hann sipaði m.a. til samráðingarnar um uttanríkispolitiskar heimildi, sum onnur hava skírt fyri eitt stórt afturstig, stjórnarlógina og samtyktina um verju- og trygdarpolitikk, sum hann metti vera eitt markant uttanríkispolitiskt frambrot fyri Føroyar.

Síðani fór løgmaður at tosa um sjálvan ríkisfelagsskapin, og aftur varð orðalagi merkt av pragmatiskum politikki og millumloysnum.

- Tað snýr seg ikki um loysing ella samband, tað snýr seg um at bera semjuna landanna millum víðari og koma til nýggj úrslit, segði løgmaður.

### Altjóða luttøka

Hóast sjálvstýrismálið var tað berandi á tíðindafundinum, tók løgmaður eisini upp møguleikar fyri limaskapi í Norðurlandaráðnum og einum tættari ES-samstarvi, hóast hetta ikki nýtist at merkja beinleiðis limaskap.

- Okkara oyggjar liggja isoleraðar í Norðuratlantshavi, og tí er tað týdningarmikið, at vit lata okkum upp í staðin fyri at grava okkum niður og isolera okkum sum tjóð. Vit verða noydd at taka lut í altjóða samstarvi, t.d. við ES-avtalum á handilsøkinum, hóast hetta als ikki merkir limaskapur.

Hann sipaði t.d. til Áland, sum uttan limaskap hevur fingið avtalur í lag við ES, og so sipaði hann til grannan Ísland, sum orsakað av opinleika og virknari altjóða luttøku fýkur framvið oyrunum á okkum.

### Samstarv á Christiansborg

Aftaná hugleiðingar um uttanríkispolitisku støðuna fór Jóannes yvir til ítøkiliga virksemi á Christiansborg. Floksformaðurin legði dent á, at flokkurin stuðlar hugskotinum um ein Norðuratlantsbólk, hóast innihaldsliga samstarvið við grønlendingar helst verður justerað, men hann legði samstundis dent á, at eitt javnaðarumboð á Christiansborg ikki fer at alliera seg við nakran einstakan flokk.

- Eg havi fyrr verið leysgangari á fólkatingi, og vit meta tað vera ein fyrimunur ikki at binda seg til ein einstakan flokk. Heldur vilja vit varðveita frælsi og rásarúm uttan nakrar bindingar og avmarkingar, segði Jóannes. Løgmaður gjørdi greitt, at tað avgerandi er, hvat hvør danskur politikari hevur at bjóða føroyingum.

### Hóvligi flokkurin

Sum flest allar aðrar valskráir og valagitation var tíðindafundurin sjálvsagt eisini merktur av banalum valretorikki við slagorðum um menning, loysnir, úrslit, framburð og nýhugsan, sum onkursvegna hoyrir við til eitt valstríð, hóst eitt og hvørt hugsandi menniskja kann taka undir við hesum uttan mun til politiska sannføring.

Men taktikkurin til komandi val er ikki at fara skeivur av. Javnaðarflokkurin marknaðarførir og profilerar seg sum ein semjusøkjandi, kompromiskendan og realpolitiskan flokk, og konseptið er heilt greitt at sementera eitt hóvligt "image" í sjálvstýrispolitiskum høpi, nú valdysturin um heitu fólkatingssessirnar á Christiansborg í í stóran mun fer at snúgva seg um viðurskiftini millum Føroyar og Danmark.